## Zuma til FCN

Sibousiso Zuma, sum í fleiri ár var álopsmakkari hjá Toda Jónsson í FCK, er nú aftur á veg til danskan fótbólt. Tað er FC Nordsjælland, sum stendur til reiðar at taka ímóti spælaranum, og sjálvur vónar Zuma, at skiftið til FCN verður vferuleiki. – Tað er sjálvandi eitt mál millum felagið, umboðsmannin og meg, men eg vóni í øllum førum, at nakað hendir innan næstu fáu vikurnar, sigur Zuma við fodbold.nu.



## Liverpool vil hava Klose

Í Liverpool vil Rafael Benitez fegin hava ein vandamiklan áleypara at spæla saman við Fernando Torres, og nú sigst, at felagið vil keypa 31 ára gamla Miroslav Klose, sum nú spælir við Bayern München. Liverpool hevur sambært enskum miðlum boðið týska stórfelagnum £13 milliónir fyri spælaran, men Inter sigst eisini vera til reiðar at rinda í minsta lagi líka nógv.

# Tankarnir høvdu hug at fara

**- Eg royndi at vera professionellur og skúgva alt annað til viks, men eg haldi at fokus fór eitt lítið sindur viðhvørt, sigur Jákup Mikkelsen, fyrrverandi málverji og liðformaður á landsliðnum**



rolant@sosialurin.fo

Rólant Waag Dam

Piatra Neamt, Rumenia: So gavst hann. Maðurin, sum trúgvur hevur tænt Føroyum og føroyskum fótbólti í meiri enn 20 ár. Jákup Mikkelsen er ikki longur partur av føroyska landsliðnum og avgerðin stendur við.

– Eg havi verið sera takksamur fyri hetta seinasta árið, og at eg havi sagt ordiliga farvæl. Tað seti eg stóra æru í, segði Jákup Mikkelsen eftir dystin í gjárkvøldið.

Áðrenn dysturin varð bríksladur í gongd, fekk hann handað eitt blómutyssi frá Høgna í Stórustovu, forseta í Fótbóltssambandi Føroya.



- Eg eri tungur í sinni, men tað hevði eg eisini roknað við, segði Jákup Mikkelsen eftir seinasta landsdystin

Mynd: Rólant Waag Dam

Men hetta og tað at hoyra tjóðsangin fyri seinastu ferð, var ikki nakað, ið órógvaði roynda málverjan.

– Eg hugsaði ikki so nógv um tað beint tá. Tankar mínir vóru kring dystin og um at fáa hann avgreiddan, segði Jákup Mikkelsen.

Men hóast drúgvar royndir og ein professionellan hugburð, so eydnaðist ikki at halda kenslunum heilt burtur.

– Eg royndi at vera professionellur og skúgva alt annað til viks, men eg haldi at fokus fór eitt lítið sindur viðhvørt, og tankarnir høvdu hug at fara aðrastaðni, tí eg var næstan givin, viðgekk Jákup Mikkelsen, sum var merktur av serligu støðuni.

– Eg eri tungur í sinni, men tað hevði eg eisini roknað við, segði hann.

### Tekur ábyrgd

Lagið gjørdist ikki betri av, at Jákup Mikkelsen sjálvur metti, at føroyska liðið kundi staðið seg nógv betri.

– Eg haldi Rumenia spælir rímiliga væl, men vit skuldu ikki tapt dystin, tí teir fáa sigurin alt ov lætt. Tað er í dystum sum hesum, at vit skulu hava stig, sigur Jákup Mikkelsen, ið heldur at málini, Rumenia fær, vóru ov bílig. Honum so líkt, tekur hann eisini tað ábyrgd av tí, ið hann kann lastast fyri.

– Málið til 1-0 var ov lætt og tað má eg nokk taka á meg sjálvur, og tað sama við tí triðja málinum, sigur Jákup Mikkelsen, ið einki nevnir um tær báðar fantastisku bjargingarnar, har bólturin í roynd og veru burdi sitið í málinum, men var steðgaður á vegnum, tí Jákup Mikkelsen vísti sítt virði enn eina ferð.

# Størsta persónligheitin nakrantíð

**Atli Gregersen er ikki í iva. – Í mínum eygum er Jákup Mikkelsen tann størsta persónligheitin í føroyskum fótbólti nakrantíð, sigur hann í eini lýsing av fyrrverandi landsliðsliðfelaganum**

Piatra Neamt, Rumenia: Atli Gregersen var ikki sørt kensluborin, tá hann eftir dystin í gjár, takkaði Jákup Mikkelsen fyri samstarvið.

– Eg hevði næstan hug at tára, tá dysturin var av, tí Jákup Mikkelsen síggja vit ikki aftur á føroyska landsliðnum. Maðurin, sum hevur bjargað okkum so ofta, sigur Atli Gregersen.

Hann metir, at tað er ein heilt serligur maður, sum í gjárkvøldi takkaði fyri seg.

– Í mínum eygum er Jákup Mikkelsen tann størsta persónligheitin í føroyskum fótbólti nakrantíð. Hann hevur givið ótrúliga nógv, sigur Atli Gregersen, sum búi á sama kamari sum Jákup Mikkelsen í Rumenia.

Frá hesum túri hevur Atli Gregersen eisini eina søgu um Jákup Mikkelsen og hvussu hann er.

– Vit skuldu venja ein morgun, men skuldu eftir venjingarklæðunum áðrenn og sjálvandi er tað Jákup Mikkelsen, sum hevur verið við síðani 1988, sum fer eftir klæðunum til Atla Gregersen, sum hevur spælt seks dystir. Tað sigur bara alt um mannin, heldur Atli Gregersen.

**Rólant**



**- Hann hevur bjargað okkum mangan, sigur Atli Gregersen um Jákup Mikkelsen**

Mynd: Rólant Waag Dam